Skúlin á Argjahamri

Trivnaðar- og nøgdsemiskanning í skúlanum á Argjahamri. Argir, 5. juni 2017

Góðu foreldur

Í samband við endurskoðan av trivnaðarætlan skúlans, hava vit sett okkum fyri at gera eina trivnaðarkanning á skúlanum skúlaárið 2016/2017.

Vit ynskja at fáa innlit í, hvussu støðan er á okkara skúla, fyri at kunna seta út í kortið ætlanir fyri komandi árini.

Vit hava biðið **Gallup Føroyar** gera kanningina, hvørs endamál at finna út av hvussu *trivnaðurin* er í skúlanum, og hvussu *nøgdsemið* er við skúlan.

Teldupostur verður sendur frá Gallup Føroyum fríggjadagin 9. juni við *leinkju*, *brúkaranavni* og *loyniorði* til at innrita seg í eina skipan, har spurningarnir eru.

Vit fara at heita á tykkum foreldur, um at svara kanningini *saman við barni tykkara*, soleiðis at úrslitini verða so eftirfarandi, sum gjørligt. Hetta tekur bert fáar minuttir.

Um tit foreldur hava fleiri børn í skúlanum á Argjahamri, fáa tit ein teldupost við brúkaranavni og loyniorði *fyri hvørt barnið*. Vit mæla eisini til at svarað verður saman við *hvørjum barni sær*.

23 spurningar er við undirspurningum í hesum økjum:

- visjón og virðisgrundarlag
- kunning
- samskifti
- menning
- innihald
- trivnaður
- happing
- skúlaumhvørvi
- skúlastýri
- heimasíða

Flestu spurningar hava stiga frá 1 til 10, har 1 altíð er tað lægsta, minsta, ringasta v.m.
og 10 altíð er tað hægsta, størsta, besta v.m.

Kanningin er frá 9. juni til og við mánadagin 19. juni 2017 á midnátt.

Við vón um góða undirtøku.

Vinarliga

Skúlin á Argjahamri, Marjun Holm